# ítróttur

Nr. 160 • mikudagur • 25. august 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo


## U-19 landsliðið hjá kvinnum úttikið

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Venjarin hjá U-19 landsliðnum hevur sent boð eftir seytjan leikarum, nú liðið skal til EM-undankappingina, sum verður í Póllandi frá 27. september til 3. oktober.

Hópurin skal koma saman seks ferðir áðrenn fráferðina, og tann fyrsti venjingardysturin hjá U-19 liðnum verður ímóti KÍ í Klaksvík hósdagin klokkan 19.45.

Hesir leikarar hava fingið landsliðsboð: Randi S. Wardum og Anna Joensen úr KÍ. Kristina D. Simonsen, Linda Weihe og Jytta Drangastein úr AB. Ása Christiansen, Ása Dam á Neystabø, Unn Kragesten og Elsa Maria Olsen úr B36. Doris í Garði Joensen, Rakul Magnussen og Mildrið Djurhuus úr EB/Streymi. Anja Klæmintsdóttir úr GÍ/B68. Sigrid Petersen úr ÍF. Heidi á Lakjuni og Jacoba Langgaard úr NSÍ og Mary-Ann Isaksen úr Skjold BK

# Landsliðsleikarar missa dystarvenjing

**Seks leikarar frá seinasta landsliðshópi spæla ikki landskappingardystir í løtuni. Hetta kann fáa stóra ávirkan á dystarformin hjá hesum leikarum undan landsdystunum ímóti Sveis og Frankaríki**



*Jón Rói Jacobsen spælir ikki landskappingardystir í løtuni vegna ósemju millum leikarafelagið og divisiónsfelagið. Spurningurin er, hvussu arbeiðssteðgurin fer at ávirka fyrireikingarnar hjá landsliðnum til komandi dystirnar*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Danska landskappingin í trimum teimum fremstu deildunum liggur í løtuni still. Orsøkin er verkfallið, sum danska leikarafelagið hevur sett í verk. Leikarafelagið vil ikki góðkenna reglurnar fyri sølu og keypi av spælarum, sum Divisionsfelagið vil seta í verk eftir tilmæli frá FIFA. Tí hava leikararnir sligið nevan í borðið og vilja ikki spæla fyri feløgini, um tey halda fast við, at hesir reglar skulu vera galdandi.

Í skrivandi stund er eingin semja í eygsjón. Eingin av pørtunum vil flyta seg í hesi arbeiðsósemju.

### Jón Rói venur við fullari ferð

Jón Rói Jacobsen hevur sína dagligu gongd í 1. deildarfelagnum Frem í Keypmannahavn. Hann sigur, at í verandi støðu venja teir við fullari ferð nærum hvønn dag.

– Vit venja framvegis, og síðst vóru vit eini fimtan til venjing. Venjararnir eru ikki til arbeiðis, og tí eru tað nakrir av teimum eldru leikarunum, ið taka sær av venjingini, sigur Jón Rói. Hann viðgongur tó, at venjingin ikki er heilt á hædd við tær, sum høvuðsvenjarin Ebbe Skovdahl skipar fyri, men teir eru í øllum førum í gongd hvønn dag. Týskvøldið skuldi Jón Rói spæla venjingardyst við 2. liði hjá Frem. Hann og tveir aðrir leikarar, ið heldur ikki eru í verkfalli, skuldu spæla við.

– Tað sigur seg sjálvt, at dystarvenjingin hjá okkum ikki verður eins góð, og hon kundi verið, nú landskappingin liggur still. Men eg rokni tó við, at teir flestu klárir bæði mentalt og kropsliga til komandi landsdystirnar. Hetta eru stórir dystir fyri okkara viðkomandi, og tí verður tað ikki torført at seta seg upp uppgávuna, sigur Jón Rói úr Keypmannahavn.

Tað skerst tó ikki burtur, at dystarvenjingin kann gerast ein rættiliga avgerandi faktorur, um landsliðið skal fáa nøktandi úrslit ímóti Sveis og Frankaríki.

Teir fimm føroysku leikararnir í donsku 1. deild missa tilsamans tríggjar dystir, um verkfallið heldur fram, inntil landsdystirnir eru á skránni.

Føroyska landsliðið skal í eldin leygardagin tann 4. september ímóti Sveis á útivølli. Síðani kemur Frankaríki á vitjan á Tórsvølli mikudagin 8. september. Ikki kann sigast, at fyrireikingarnar eru optimalar, um ein stórur partur av leikarunum ikki hava spælt ein veruligan landskappingardyst í fleiri vikur frammanundan.

Frá seinasta leikarahópi eru tað Andrew av Fløtum, Jann Ingi Petersen og Hjalgrím Elttør (allir úr Fremad Amager), Johan Byrial Hansen (AC Horsens), Jón Rói Jacobsen (Frem) og Todi Jónsson (FCK), ið eru raktir av verkfallinum.

Vit royndu at fáa fatur á Henrik Larsen, landsliðsvenjara, men hetta eydnaðist ikki til dagsins útgávu av Sosialinum.

# Vieira ikki tøkur ímóti Føroyum

**Nýggi liðformaðurin á franska landsliðnum, Patrick Vieira, verður neyvan við í dystinum á Tórsvølli tann 8. september**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Franski landsliðsvenjarin klórar sær óivað í skallanum í hesum døgum. Tað tykist greitt, at miðvallargeneralurin, Patrick Vieira, ikki verður tøkur til komandi landsdystirnar hjá Frankaríki ímóti Ísrael tann 4. september og Føroyum 8. september.

Hetta er steinur omaná byrðu hjá venjaranum, tí at seinastu vikurnar hava fleiri av teimum heilt stóru stuðulsleikarunum boðað frá, at teir gevast á landsliðnum. Og nú skal venjarin, Raymond Domenech, eisini vera Vieira fyriuttan í tveimum teimum fyrstu dystunum í hesi undankappingini. Vieira er nýliga útnevndur sum nýggjur liðformaður á franska landsliðnum.

Vieira fekk ein lærskaða undir EM-endaspælinum, og hann hevur ikki verið førur fyri at spæla við fullari ferð síðani. Tí er ikki væntandi, at hann verður klárur til komandi landsdystir.

### Nýtt lið

Eftir EM-endaspælið boðaðu Zinedine Zidane, Lilian Thuram, Bixente Lizarazu og Marcel Desailly frá, at teir ikki vildu spæla á landsliðnum longur. Tí er tað ein dyggur smeitur fyri landsliðið at missa ein av sínum royndastu leikarum, sum skal lyfta arvin eftir hesar leikarar.

Domenech skal tí byggja eitt heilt nýtt lið upp uttan hesar leikarar, og fyrsta uppgávan verður dystirnir ímóti Ísrael og Føroyum, sum eru smátjóðir í fótbóltshøpi. Tað liggur tí eitt ávíst trýst á franska liðnum undan hesum dystunum. Teir skulu nú vísa, at teir kunnu lyfta arvin eftir teir leikarar, sum megnaðu at vinna bæði HM í 1998 og EM í 2000.



# Kvinnurnar bastu allari mótstøðu

**Arnleyg Mikkelsen og Marjun Restorff vunnu barometur kappingina í bridge, sum var um vikuskiftið**

*Bridge*

Bridgehúsið í Havn skipaði leygardagin 21. august fyri stórari almennari parkapping í bridge. Kappingin, ið var væl stuðla av Føroya Tele, varð skipað sum ein barometur kapping. 22 pør høvdu boðað frá luttøku. Kappingin gjørdist sera spennandi, sjálvt um tað eina parið við Arnleyg Mikkelsen og Marjun Restorff beinanvegin legði seg á odda, vóru tað fleiri pør, sum lógu framvið og royndu at koppa tær av ovastu rók. Men Arnleyg og Marjun hildu fast og vunnu sostatt eisini kappingina.



*Vinnararnir Arnleyg og Marjun fáa vinningin handaðan av stjóranum í Føroya Tele, Andrasi Róin*

**Samlaða støðan:**

| | | |
|---|---|---|
| 1) | Arnleyg Mikkelsen - Marjun Restorff | 378 |
| 2) | Jóannes Mouritsen - Hedin Mouritsen | 362 |
| 3) | Reimund Langgaard - Dia Petersen | 340 |
| 4) | Jóna Grunnveit - Jógvan Juel | 338 |
| 5) | Bogi Simonsen - Símin Lassaberg | 321 |
| 6) | Asla Weihe - Hanus Bærentsen | 317 |
| 7) | Laila Danielsen - Maria Christiansen | 313 |
| 8) | Arant Berjastein - Magni Jøkladal | 311 |
| 9) | Tórhedin T. Thomsen - Danny Danielsen | 309 |
| 10) | Jan Petersen - Hermundur Jóhannesen | 307 |
| 11) | Zakaris Joensen - Høgni Jacobsen | 306 |
| 12) | Jákup Hjaltalin - Jens Pauli G. Nolsøe | 304 |
| 13 | Arnbjørn Sivertsen - Carl Mikkelsen | 293 |
| 14) | Birna - Egil Helmsdal | 286 |
| 15) | Marner Joensen - Jórun Johannesen | 286 |
| 16) | Gunnar Mouritsen - Høgni Vesturklett | 283 |
| 17) | Peter Sigurd Rasmussen - Helgi | 282 |
| 18) | Eyðun Anthoniussen - Robert Langgård | 279 |
| 19) | Heini Joensen - Hans J. Poulsen | 263 |
| 20) | Andras Róin - Kristina Ottosdóttir | 256 |
| 21) | Ingolf Olsen - Haldor Ellingsgaard | 241 |
| 22) | Finnur Petersen - Mortan | 231 |

### Spæl

Besti hátturin at síggja hvussu flott hetta splælið er, er fyrst at royna tað sum eina uppgávu áðrenn tú lesur loysnina.
E/NS

**Norðan**
Sp A Q 10
Hj A K J 10 9 7
Rú A Q
Kl J 2

**Eystan**
Sp K J 8 7 5
Hj 2
Rú 7 5 2
Kl 9 8 6 5

| Sunnan | Vestan | Norðan | Eystan |
|---|---|---|---|
| - | - | - | Pass |
| Pass | 1 rú | 2 rú | Pass |
| 2 hj | Pass | 4 hj | Pass |
| Pass | Pass | | |

### Útspæl spar 4

Sunnan spælir spar damu frá borðinum, og tú tekur við konginum. Tú væntar at sunnan ikki er ein av teimum, ið meldar tveir hjartar við trimum lítlum hjartarum og einari vánaligari hond. So um meldið skal setast, skulu tit hava tvey stikk í spari og tvey í kleyv. Men kann hetta ikki gerast sera tórført?

### Loysn

Eftir at hava fingið fyri spar kong hevur tú ein trupulleika, sjálvt um tú kanska ikki sært hann. Um tú spælir ein kleyvara, ið sær safe út at gera, vinnur makkarin við damuni og spælir meir spar. Sunnan tekur fyri essi og spælir tvær ferð trumf og síðani kleyvar bónda, ið vestur má taka við essinum. Vestur hevur ikki spar eftir og má tískil geva sunnan fyri kleyvar kong og spar tíggju vera kastað av frá borðinum.

Tað er sera tórført at síggja, men fyri at seta meldið, skal eystan skifta til sín staka trumf. Nú vinnur sunnan ongantíð sítt meld.

### Hinar hendurnar:

**Vestur**
Sp 9 4
Hj 8 3
Rú K J 10 9 4
Kl A Q 10 7

**Sunnan**
Sp 6 3 2
Hj Q 6 5 4
Rú 8 6 3
Kl K 4 3

# Kappsigling á Skálafjørðinum

**Sunnudagin vóru 28 bátar við í kappsiglingini, sum Lions Club skipaði fyri**

SIGLING
*Tíðindaskriv*

Líkindini hendan dagin vóru ikki av teimum bestu. Ein ond av høgum vestri, sum á hálvari leið mestsum gav upp ondina fyri síðani at lækka niður í ein lágan vestan. Men hóast teir í Grikkalandi tvær ferðir máttu avlýsa sínar kappingar av somu orsøk, vórðu seglini sett klokkan hálvgum fýra, og tann seinasti báturin fór um málstrikuna klokkan tíggju minuttir yvir seks. Tolnir sótu teir og slotaðu eftir hvar frægasti gráðin var at heinta, sum kundi fáa seglið at standa frá. Av teimum 28 bátunum, ið høvdu meldað til, komu teir 24 á mál.

Hetta er 35. árið, at Lions Club skipar fyri kappsigling, og í tí sambandi fingu allir luttakararnir eina t-troyggju, ein kalendara umframt bókina, sum Regin Debess gav út í sambandi við 25 ára dagin fyri kappsiglingini.

Lions Club letur væl at kappingini í ár, og væntandi verður skipað fyri kapping aftur næsta ár.

**Úrslitið av kappsiglingini á Skálafirði 2004, sum Lions Club Eysturoy skipaði fyri**

| nr | bátanavn | Bátaeigari |
|---|---|---|
| 1 | m/b Hoyvíksbáturin | Birgir Johan Simonsen, Hoyvík |
| 2 | m/b Niels í Nesinum | Alfred Gullbein, Tórshavn |
| 3 | m/b Olivia | Jóan J. Andreassen, Kollafjørð |
| 4 | m/b Nón | Agnar Olsen, Hósvík |
| 5 | m/b Sildin | Jónsvein Mikkelsen, Toftir |
| 6 | m/b luddi | Dávur Thomassen, Kollafjørð |
| 7 | m/b Eyð | Atli Leitisstein, Runavík |
| 8 | m/b Ternan | Kári Borgarklett,Hósvík |
| 9 | m/b Miðgerð | Arngrim Petersen, Kollafjørð |
| 10 | m/b Falkurin | Kári Hansen, Strendur |
| 11 | m/b Svanur | John Mikkelsen, Skála |
| 12 | m/b Pluto | Meinhard Christensen, Skála |
| 13 | m/b Teistin | Símun Poulsen, Strendur |
| 14 | m/b Gjáarbáturin | Janus Petersen, Kollafjørð |
| 15 | m/b Leivur | Bjarni Petersen, Kollafjørð |
| 16 | m/b Vinur | Óli Mikkelsen, Tórshavn |
| 17 | m/b Helga | Kaj MJohannesen, Kaldbak |
| 18 | m/b Búgvin | Per Mikkelsen, Strendur |
| 19 | m/b Jóan Pauli | Jóhannus Johannesen, Kollafjørður |
| 20 | m/b Kollsteinur | Mikkjal Hansen, Hósvík |
| 21 | m/b Malli | Odmar Joensen, Kollafjørð |
| 22 | m/b Góðadalsbáturin | Anfinnur Hjalmarsson, Argir |
| 23 | m/b Havgásin | Edvard Hermansen, Hósvík |
| 24 | m/b Robin Hood | Jonhard á Marknagarði, Saltanará |